# Róðrarsamband Føroya

## Lóg fyri Róðrarsamband Føroya

## Seinast broytt við aðalfundarsamtykt frá 18. mars 2023

### Kapittul 1
### Almennar ásetingar

*Navn, adressa og løgfrøðilig skipan*

**§ 1.** Navn felagsins er Róðrarsamband Føroya, stytt RSF. Felagið, sum er limur í Ítróttarsambandi Føroya, stytt ÍSF, er ein samgonga av øllum feløgum í Føroyum, sum íðka kappróður. RSF er ein privatur ikki vinnuligur áhugafelagsskapur, sum virkar sambært føroyskari lóggávu, við høvuðssæti í Tórshavn. Fíggjarliga grundarlagið er inntøka av luttøkugjaldi, stuðlum og parti av landskassastudningi o.ø. Øll boð, sum hava við virksemi felagsins at gera, kunnu latast til almennu teldupostadressuna hjá felagnum, sum er rsf@rsf.fo

*Endamál*

**§ 2.** Endamálið hjá RSF er at skipa fyri kappróðri, at menna, stuðla, skapa áhuga fyri og at umboða róður í alheims og millumlanda róðrasamgongum. Leiðreglurnar hjá ÍSF “Góður atburður” eru galdandi fyri alt virksemið hjá RSF og tess feløgum.

*Óheftni*

**§ 3.** RSF er óheft av politiskum, sosialum og átrúnaligum málum.

*Limaskapur*

**§ 4.**[1] Ítróttarfelag, sum íðkar kappróður, skal lúka treytirnar fyri at gerast limur í RSF. Umsókn um limaskap skal latast nevndini
hjá RSF, sum ger av, um felag kann gerast limur.
Stk. 2. Nevndin hjá RSF skal í sambandi við umsóknina um limaskap góðkenna teir litir, sum felagið ætlar at nýta til bátarnar.
Stk. 3[1]. Felag, sum vil melda seg úr RSF, skal minst 2 vikur frammanundan boða nevndini hjá RSF frá hesum.
Stk. 4.[1] Felag, sum ikki er limur í RSF, kann ikki luttaka í FM kapping ella møta á aðalfundi hjá RSF.
Stk. 5. [1] Felag, sum er limur í RSF, skal hava øll tryggingarviðurskiftir í lagi.
Stk. 6. [1] Felag, sum er limur í RSF, skal syrgja fyri, at nevndin í felagnum er mannað og navngivin.
Stk. 7.[1] Felag, sum er limur í RSF, skal dagføra upplýsingar á heimasíðuni rsf.fo í seinasta lagi 1 viku áðrenn aðalfundin hjá RSF.

*Aðalfundurin*

**§ 5.** Aðalfundurin er hægsti myndugleiki hjá RSF og hevur heimild at áseta reglur v.m. Aðalfundurin er bert viðtøkuførur, um hann er innkallaður á rættan hátt.
*Stk. 2.* Aðalfundurin verður hildin áðrenn 1. apríl á hvørjum ári og skal verða fráboðaður feløgunum skrivliga umvegis teldupost minst 2 mánaðir frammanundan við í minsta lagi hesi dagsskrá:

---

[1] Broytt á aðalfundi 2023

1. Val av orðstýrara
2. Formaðurin greiðir frá virki sambandsins í farna ári
3. Formaðurin leggur fram grannskoðaðan roknskap
4. Innkomin mál
5. Ásetan av stevnudagfesting næsta kappingarár
6. Ásetan av atgongumerkjaprísi
7. Val av nevndum og eykalimum
8. Val av uttanhýsis grannskoðara
9. Ymist

*Stk. 3.* Í nevndini hjá RSF eru upp til 6 limir.
*Stk. 4.* Formaðurin, sum er limur 1, verður valdur beinleiðis á aðalfundinum annaðhvørt ár (líka ár) saman við limunum 3 og 4. Næstformaðurin, sum er limur 2, verður valdur beinleiðis á aðalfundinum annaðhvørt ár (ólíka ár) saman við limunum 5 og 6.
*Stk. 5.*[2] (Strikað)
*Stk. 6.* Í Dómsnevndini hjá RSF eru 3 limir.
Dómsnevndin arbeiðir sambært reglugerð hjá ÍSF.
*Stk. 7.* Limir 1 og 2 í dómsnevndini verða valdir beinleiðis á aðalfundinum hjá RSF annaðhvørt ár (ólíka ár), og limur 3 verður valdur beinleiðis á aðalfundinum hjá RSF annaðhvørt ár (líka ár). Teir verða valdir fyri 2 ár í senn. Samstundis verða tiltakslimir valdir fyri limirnar.
*Stk. 8.* Nevndarlimur í róðrarfelag kann ikki gerast limur í dómsnevndini.
*Stk. 9.* Dómsnevndin skipar seg sjálv.

**§ 6.** Hvørt limafelag kann senda 3 umboð til aðalfundin. Eingin kann á aðalfundi umboða róðrarfelag uttan at hava verið limur í felagnum í minsta lagi ein mánaða og uttan at hava limagjalds- og onnur limaviðurskifti, sum eru viðkomandi fyri RSF, í lagi. Harumframt skal felag hava luttikið við í minsta lagi einari manning í tveimum FM-róðrum undanfarnu trý kappingarárini.
*Stk. 2.* Einki felag kann atkvøða á aðalfundi uttan at hava síni fíggjarligu og umsitingarligu viðurskifti í lagi við RSF.
*Stk. 3.* Á aðalfundinum ber ikki til at atkvøða við fulltrú ella við brævatkvøðu.
*Stk. 4.* Felag, ið hevur havt, og felag, sum skal hava stevnu, hava skyldu at møta á fundinum.
**§ 7.** Atkvøðurætt á aðalfundinum hava feløgini við einari atkvøðu hvørt. Nevndin hjá RSF hevur somuleiðis altíð eina atkvøðu.

**§ 8.** Á aðalfundinum kunnu lógaruppskot ikki verða viðgjørd ella lógarbroytingar gjørdar, uttan at tær standa á fundarskránni. Uppskot um lóg og lógarbroyting skulu umvegis teldupost vera nevndini hjá RSF í hendi í seinasta lagi 6 vikur áðrenn aðalfundin.
*Stk. 2.* Nevndin í RSF eftirkannar innkomin uppskot til lógarbroytingar við atliti at samlaða lógarverkinum.
*Stk. 3.* Um komið verður eftir, at uppskotið ikki er í samsvari við samlaða lógarverkið, fær uppskotstillarin boð um hetta við tilmæli frá RSF um at broyta uppskotið. Broytir uppskotstillarin ikki uppskotið samsvarandi tilmælinum frá RSF, mælir RSF aðalfundinum frá at samtykkja tað.
*Stk. 4.* RSF sendir innkomnu uppskotini um lóg og lógarbroytingar til limafeløgini í seinasta lagi 4 vikur áðrenn aðalfundin.
*Stk. 5.* Broytingar til innkomin lógarmál, eisini broytingar frá lógaruppskotstillara sjálvum til egin lógaruppskot, kunnu ikki viðgerast, uttan so at broytingin skrivliga er fráboðað nevndini hjá RSF í seinasta lagi 2 vikur áðrenn aðalfundin.
*Stk. 6.* Nevndin hjá RSF sendir limafeløgunum broytingaruppskotini í telduposti í seinasta lagi 1 viku áðrenn aðalfundin.
*Stk. 7.* Uppskot í sambandi við nevndarval og onnur broytingaruppskot enn uppskot til lógarbroytingar skulu, fyri at verða viðgjørd, verða send nevndini hjá RSF í telduposti í seinasta lagi 2 vikur áðrenn aðalfundin.

[2] Broytt á aðalfundi 2022

*Stk. 8.* Fyri at uppskot skal verða samtykt á aðalfundi, skal meira enn helmingurin av teimum møttu, sum hava atkvøðurætt, atkvøða fyri. Stendur á jøvnum, er uppskotið fallið.
*Stk. 9.* Eru 2 ella fleiri uppskot um sama mál, verður atkvøtt um øll uppskot. Tað, sum fær flestar atkvøður, verður samtykt. Stendur á jøvnum millum 2 ella fleiri uppskot eftir fyrstu atkvøðugreiðslu, verður atkvøtt av nýggjum um hesi uppskot. Stendur enn á jøvnum millum tvey ella fleiri uppskot, er uppskotið fallið.

*Eykaaðalfundur*

**§ 9.** Eykaaðalfundur kann verða hildin, um nevndin hjá RSF sambært nevndarsamtykt ynskir tað, ella um helvtin av limafeløgunum ynskja tað.
*Stk. 2.* Eykaaðalfundurin skal vera fráboðaður limafeløgunum í telduposti í minst 1 viku frammanundan við nágreiniligari dagsskrá.

*Nevndin*

**§ 10.** Nevndin hjá RSF hevur dagligu leiðsluna av felagnum. Nevndin ásetur nærri reglur um kapping, sum skulu góðkennast á aðalfundi, eykaaðalfundi ella skrivliga av einum meiriluta av teimum feløgum, sum møttu á seinasta aðalfundi.
*Stk. 2.* Nevndin er viðtøkufør, tá 3 limir eru á fundi, harímillum formaðurin og næstformaðurin, smbr. tó § 13 um uppafturtøku av málum.
*Stk. 3.* Formaðurin í nevndini boðar til fundar við í minsta lagi 2 daga freist við dagsskrá og skal boða til fundar, um tveir limir biðja um tað.
*Stk. 4.* Um mál ikki kann bíða til vanlig innkallingarfreist er farin, kann málið viðgerast, um tveir nevndarlimir taka undir við hesum.
*Stk. 5.* Stendur á jøvnum, tá atkvøtt verður, er atkvøðan hjá formanninum avgerandi.
*Stk. 6.* Nevndin fær onga samsýning fyri starv sítt.
*Stk. 7.* Nevndin skal útinna viðtøkur, sum eru gjørdar á aðalfundi.
*Stk. 8.* Nevndin velur eina nevnd við 3 persónum, sum hevur øll fíggjarlig viðurskifti um hendi.
*Stk. 9.* Nevndin hevur heimild til at seta undirnevndir og um neyðugt við limum uttan fyri RSF. Nevndin ger reglugerð um virksemið hjá undirnevndum, sum settar verða. Nevndin er ikki bundin av avgerðum, sum undirnevndir hava tikið, og kann broyta hesar.

*Tekningarreglur*

**§11.** RSF verður bundið við undirskrift av formanninum og einum nevndarlimi, ella av næstformanninum og tveimum nevndarlimum.

*Avtøka av felagnum*

**§ 12.** Uppskot um at taka av felagið kann bert leggjast fram á aðalfundi og verður við atliti at freist til at gera viðmerkingar viðgjørt sambært ásetingunum um at broyta lógir felagsins. Fyri av verða samtykt, skal uppskotið samtykkjast við 3⁄4 av teimum, ið hava atkvøðurætt, samstundis sum í minsta lagi 3⁄4 av limafeløgunum skulu vera umboðað á fundinum. Verður felagið tikið av, verða møguligar ognir latnar ÍSF.

## Kapittul 2
## Kæru og agamál

**§ 13.** Limafeløg í RSF kunnu kæra avgerðir í sambandi við kapping ella um onnur viðurskifti innan virkisøkið hjá RSF til nevndina hjá RSF. Nevndin hjá RSF kann eisini av egnum ávum taka tilburð upp til viðgerðar og taka avgerð í málinum, eftir at hava hoyrt viðkomandi partar í málinum.
*Stk. 2.* Nevndin hjá RSF kann ikki taka avgerð um at strika meistaraheitið, at broyta meting dómarans í kapping, undir hesum at broyta avgerð dómarans um at góðkenna ella kolldøma kappróðrarøkið.

Tó kann nevndin taka støðu til døming um raðfylgju sambært videoupptøkum í málinum.
*Stk. 3.* Kærumál skulu skrivliga vera nevndini hjá RSF í hendi í seinasta lagi 2 samdøgur eftir, at avgerðin er tikin, saman við prógvi um, at kr. 500 eru goldnar. Kæran skal vera undirskrivað av í minsta lagi einum limi úr nevnd felagsins. Snýr kæran seg um viðurskifti viðvíkjandi báti og/ella viðvíkjandi kapping, skal kæran eisini vera undirskrivað av bátsformanninum. Hetta kann tó ikki vera sami persónur sum nevndarlimurin.
*Stk. 4.* Verður kæran gingin á møti, fær tann, sum kærir, upphæddina afturgoldna. Verður kæran ikki gingin á møti, verður peningurin ikki afturgoldin.
*Stk. 5.* Snýr kæran seg um viðurskifti viðvíkjandi kapping, skal nevndin hjá RSF hava avgreitt kæruna skrivliga í seinasta lagi dagin fyri næsta kappingardag og í seinasta lagi seks samdøgur eftir síðsta róður á árinum, á Ólavsøku.
*Stk. 6.* Verður komið eftir, at róð hevur verið við ólógligum báti á stevnu, ella at rógvari ella annar avvarandi hjá kappróðararfelagi hevur víst ósømiligan atburð undir róðri og/ella á ferðing millum heimstað og róðrarstað, skal RSF taka málið upp til viðgerðar. Sama ger seg galdandi, um so er, at luttøkuseðil ikki er í samsvar við róðramanning, ella at rógvari/róðursmaður rør/stýrir í fleiri bátum sama dag, uttan loyvi frá RSF.
*Stk. 7.* Hevur felag róð við ólógligum báti á stevnu, kann báturin kolldømast. Verður báturin kolldømdur, sleppur hann ikki at rógva aftur, fyrr enn hann er blivin sýnaður umaftur av RSF, og fyrr enn nýtt loyvisbræv er útflýggjað móti rindan av 500 kr. Døming verður gjørd við afturvirkandi kraft.
*Stk. 8.* RSF hevur heimild at revsa rógvarar og onnur avvarandi hjá kappróðrafelagi, ið sýna ósømiligan atburð undir róðri og á ferðing millum heimstað og róðrarstað. Revsingin er bót og/ella burturvísing frá kappróðri.
*Stk. 9.* Meginreglurnar í almenna fyrisitingarrættinum, undir hesum reglurnar um luttøkuføri og partshoyring, eru galdandi fyri málsviðgerðina hjá RSF av kæru og agamálum.
*Stk. 10.* Nevndin hjá RSF kunnar partarnar skrivliga um avgerðina. Í fráboðanini verða partarnir kunnaðir um, at avgerðin kann kærast til dómsnevndina innan 1 viku eftir, at teir hava fingið kunnleika um avgerðina.
*Stk. 11.* RSF kann í heilt serligum førum og við haldgóðum prógvum taka mál upp til nýggja viðgerð, eftir at kærufreistin er farin. Hetta er tó bert galdandi, um so er, at ein fullmannað og samd nevnd tekur avgerð um tað.

## Kapittul 3
## Dómsnevndin

**§ 14.** Allar avgerðir innan virkisøkið hjá RSF, eisini avgerðir sum eru tiknar av RSF, kunnu leggjast fyri dómsnevndina, sum hevur heimild til at taka avgerð í øllum málum innan virksemið hjá RSF, íroknað tulking av lógum og samtyktum. Dómsnevndin kann tó ikki taka avgerð um at strika meistaraheitið, at broyta meting dómarans í kapping, undir hesum at broyta avgerð dómarans um at góðkenna ella kolldøma kappróðaraøkið. Tó kann dómsnevndin taka støðu til døming um raðfylgju sambært videoupptøkum í málinum.
*Stk. 2.* Meginreglurnar í almanna fyrisitingarrættinum, undir hesum reglurnar um luttøkuføri og partshoyring, eru galdandi fyri málsviðgerðina hjá dómsnevndini.
*Stk. 3.* Dómsnevndin kann, sambært avtalu við nevndina hjá RSF, biðja um sakkøna hjálp í sambandi við málsviðgerðina.
*Stk. 4.* Í seinasta lagi tvær vikur eftir at dómsnevndin hevur móttikið kæruna, skal hon gera úrskurð og kunna partarnar skrivliga. Samstundis verður RSF kunnað um avgerðina.

**§ 15.** Allar avgerðir hjá dómsnevndini eru endaligar og kunnu ikki viðgerast av RSF.
*Stk. 2.* Gongur dómsnevndin ikki kæruni heilt ella partvís á møti, skal dómsnevndin skrivliga upplýsa kæraranum ella honum, sum avgerðin viðvíkur, at avgerðin kann skjótast inn fyri Ítróttardómstólin í seinasta lagi 1 viku eftir, at partarnir hava fingið kunnleika um úrskurðin.

## Kapittul 4
## Stevnur

**§ 16.** Tað eru 7 stevnur, sum geva stig til føroyameistaraheitið í kappróðri. Tær eru Norðoyarstevna, Fjarðastevna, Eystanstevna/Varmakelda, Jóansøka, Sundalagsstevna, Vestanstevna og Ólavsøka.

**§ 17.** Í seinasta lagi 1 viku áðrenn aðalfundin, skal RSF hava fráboðan um, nær stevnurnar verða árið eftir. RSF sendir bræv til stevnufyrireikararnar, samstundis sum innkalling til aðalfundin hjá RSF verður send og minnir á, at í seinasta lagi 1 viku áðrenn aðalfundin skal RSF hava at vita, nær stevna teirra verður árið eftir. Um so er, at felag ikki hevur boðað frá hesum, verður stevnan dagsett á aðalfundinum.

**§ 18.** Róð skal verða fyrra stevnudag (leygardag og á ólavsøku, ólavsøkuaftan). Um serligar umstøður gera seg galdandi, kann hetta verða broytt av RSF ella høvuðsdómarunum.

**§ 19.** RSF hevur tvey umboð, sum eru eygleiðarar á hvørjari stevnu.

**§ 20.** Fyri arbeiði sítt á stevnum fáa dómararnir kr. 1.250 hvør fyri hvørja stevnu. Stevnufyrireikararnir rinda RSF upphæddina í seinasta lagi 2 vikur eftir stevnuna. RSF rindar síðani dómarunum peningin. Um peningurin ikki verður goldin rættstundis, verða kr. 250 lagdar aftrat teimum kr. 1.250, sum hvør einstakur dómari skal hava.

## Kapittul 5
## Kappingarteinar og bólkar

**§ 21.** Róðrarnir í øllum bátastøddum eru 1000 m. Barnaróður er tó 500 m.
*Stk. 2.* Tað verður sett ein nágreinilig klokkutíð fyri, nær hvør einstakur róður verður. Hendan klokkutíð má ikki framskundast uttan heilt serlig viðurskifti gera seg galdandi. Broyttu tíðirnar kunngerast í góðari tíð.
*Stk. 3.* Koma seinkingar í av einari ella aðrari orsøk, skulu fyrireikararnir skjótast tilber varskógva rógvarar, útvarpsbátin og áskoðarar. Høvuðsdómararnir áseta nýggja klokkutíð fyri, nær róðrarnir verða avgreiddir.
*Stk. 4.* RSF ásetir í hvørjum einstøkum føri raðfylgjuna, sum róð verður í. Eru umstøðurnar soleiðis, at teinurin ikki kann vera sum ásett, kann hann verða styttur.
*Stk. 5.* Róð verður um FM í 5 mannaførum gentur, dreingir og kvinnur, 6 mannafør menn og kvinnur, 8 mannafør menn og 10 mannafør menn. Stig verða lutað sambært § 45 í lóg um kappingarreglur hjá Róðrarsambandi Føroya.
*Stk. 6.* Róð verður um FM í barnaróðri, 5 mannafør gentur og dreingir, har stig verða lutað sambært § 45 í lóg um kappingarreglur hjá Róðrarsambandi Føroya.
*Stk. 7.* Róð verður um FM í masters 6 mannafør kvinnur og 10 mannafør menn. Stig verða lutað sambært§ 45 í lóg um kappingarreglur hjá Róðrarsambandi Føroya.

## Kapittul 6
## Aldursmark

**§ 22.** Í barnaróðri skal rógvari ganga í 5. 6. ella 7. flokki í tí kappingarári, tá kappingin byrjar.Við kappingarárið er at skilja tíðin frá og við 1. januar til og við 31. desember. Tó skal róðursmaðurin fylla 18 ár, áðrenn kappingarárið byrjar.

**§ 23.**[3] 5 mannafør við gentum og dreingjum rógva í tveimum bólkum. Tey, sum eru 16 ár ella yngri í kappingarárinum, rógva fyri seg, og tey, sum fylla 17 ella 18 ár í kappingarárinum rógva fyri seg.
Við kappingarárið er at skilja tíðin frá og við 1. januar til og við 31. desember.
*Stk.2.* Tó kunnu tey, sum eru 16 ár ella yngri í kappingarárinum velja at rógva saman við teimum, sum hava fylt 17 ella 18 ár í kappingarárinum. Í so fall er hetta galdandi fyri alt kappingarárið.

**§ 24.**[4] Við 5 mannaførum kvinnum, 6 mannaførum, 8 mannaførum og 10 mannaførum er einki aldursmark á rógvarum, tó at minst tveir rógvarar skulu fylla minst 18 ár í kappingarárinum. Við kappingarárið er at skilja tíðin millum 1. januar til og við 31. desember.

**§ 25.** Í masters kvinnur og menn skal rógvari fylla í minsta lagi 36 í kappingarárinum. Tó kunnu tveir rógvarar vera yngri. Hesir skulu tó fylla minst 31 ár í kappingarárinum. Við kappingarárið er at skilja tíðin frá og við 1. januar til og við 31. desember.

**§ 26.** Róðursfólk á øllum bátum skal fylla minst 15 ár í kappingarárinum. Fyri barnaróður er ásetingin í § 22 tó galdandi. Við kappingarárið er at skilja tíðin frá 1. januar til og við 31. desember.

## Kapittul 7
## Til – og frámelding

**§ 27.** Tilmeldan av bátum skal fara fram skrivliga til RSF í seinasta lagi 2 vikur áðrenn fyrstu FM-stevnu. Um tilmeldaður bátur ikki ætlar sær á onkra av nevndu stevnum, skal hetta verða fráboðað RSF skrivliga í seinasta lagi 5 dagar áðrenn rógvast skal (vanliga mánadag).

*Stk. 2.* Um bátur ikki meldar til fyrstu FM-stevnu, skal báturin vera tilmeldaður 5 dagar áðrenn ta fyrstkomandi stevnuna, báturin ætlar at luttaka á. Hetta er galdandi fyri bæði nýggjar og gamlar bátar. Tað skal bert tilmeldast ta einu ferðina, so verður báturin tilmeldaður restina av stevnunum av RSF.
*Stk. 3.* Um bátur ikki lýkur tær fyrisettu til- og frámeldingartreytirnar verður felagið sektað við bót á kr. 1.000, og kann bátur verða útihýstur frá komandi stevnu.
*Stk. 4.* Um til- og frámeldingarfreistin verður brotin tvær ferðir í sama kappingarári av sama felagi, verður felagið sektað við bót á kr. 2.000, og kann bátur verða útihýstur frá stevnu restina av árinum.
*Stk. 5.* Brot á til- og frámeldingartreytirnar til ólavsøkukappróðurin verður sektað við bót á kr. 1.500, og kann bátur ikki luttaka aftur, fyrr enn hesin peningur er goldin.

**§ 28.** Fyri at kunna luttaka í ólavsøkuróðrinum skal bátur hava luttikið í minst tveimum av undanfarnu seks FM-róðrum. Tó kunnu gestaluttakarar luttaka í ólavsøkuróðrinum, um pláss er. Gestaluttakarar verða tó hildnir uttanfyri FM-stigabýtið.

**§ 29.** Rógvari, sum byrjar at venja við einum felag, kann ikki fara at rógva fyri annað felag eftir 25. apríl í sama ári, uttan so at fyrra felagið gevur loyvi til tess.
*Stk. 2.* Loyvið skal vera skrivligt, og avrit skal sendast til RSF. Ivamál kunnu leggjast fyri RSF til avgerðar.
*Stk. 3.* Tó kunnu rógvarar 18 ár ella eldri, sum rógva við FM fyri vaksin, stýra øðrum bátum, eisini bátum hjá øðrum feløgum í FM í barnaróðri.

**§ 30.** Tað er loyvt at luttaka í mesta lagi í tveimum róðrum á somu stevnu, at rógva í einum og stýra einum øðrum, ella at stýra tveimum róðrum. Hetta skal tó ikki seinka um avgreiðsluna av nøkrum róðri, og tí er ikki loyvt at luttaka í tveimum fylgjandi róðrum. Loyvt er ikki at luttaka hjá

[3] Broytt á aðalfundi 2021
[4] Broytt á aðalfundi 2022

tveimum ymiskum róðrarfeløgum, uttan tá barnaróður er annar.
*Stk. 2.* Um so er, at rógvari ella róðursmaður gerst sjúkur ella skaddur ella í heilt serligum førum ikki kann luttaka, kann manning taka ein annan rógvara ella róðursmann at luttaka í øðrum ella í triðja róðri sama dag. Hetta skal altíð fráboðast skrivliga og góðtakast av høvuðsdómarunum. Um ivamál eru, kann læknaváttan verða kravd.
*Stk. 3.* Henda støða skal í fyrsta lagi verða íkomin dagin fyri stevnuna. Umsókn skal sendast til RSF ella latast inn skrivliga til høvuðsdómaran á landi.

## Kapittul 8
## Døming

**§ 31.** Høvuðsdómararnir, sum eru tveir í tali, eru tilnevndir av RSF og eru hægsti myndugleiki á økinum. Høvuðsdómararnir kunnu, í upp til tveir tímar eftir at róður hevur verið, strika róðurin, um tað vísir seg at hava verið umstøður undir róðrinum, sum við vissu kunnu sigast at hava ávirkað úrslitið av róðrinum, og sum høvuðsdómararnir ikki høvdu møguleika til at meta um undir róðrinum.

**§ 32.** Við høvuðsdómarabátinum mugu bert vera førarin á bátinum og annar høvuðsdómarin. Tann høvuðsdómarin, sum er á bátinum, kann loyva øðrum at koma við, tá serligar orsøkir eru til tess.

**§ 33.** Aftaná startin og til bátarnir koma á mál, skal frá høvuðsdómaranum verða ansað eftir, at róðurin fer regluliga fram.

**§ 34.** Stoyta tveir bátar saman, og tað ikki kann sigast at vera gjørt við vilja, kann høvuðsdómarin steðga róðrinum og krevja nýggjan start. Hetta skal bert verða gjørt, um høvuðsdómarin við vissu heldur, at úrslitið í stigatalvuni hevði verið øðrvísi, um ikki samanstoytur var hendur.
*Stk. 2.* Umróður kann steðga til aftaná seinasta start. Vil bátur ikki rógva umaftur, verður hann koyrdur úr kappingini galdandi kappingardag.

**§ 35.** Undir kappróðrinum skulu vera tveir startdómarar og eitt hjálparfólk, við stongina á landi, sum eru tilnevnd av RSF. Við startdómarabátinum mugu bert vera førarin á bátinum og startdómararnir.
*Stk. 2.* Startdómararnir kunnu loyva øðrum at koma við, tá serligar orsøkir eru til tess.

**§ 36.** Startdómararnir skulu syrgja fyri, at kjósirnar liggja á linju, tá ið startað verður.
*Stk. 2.* Startdómarin hevur heimild til at skjóta róðurin av upp til 20 sekund eftir startin.
*Stk. 3.* Hongur bátur eftir skal róðurin skjótast av.
*Stk. 4.* Áðrenn skotið verður, skal dómarin týðiliga rópa: klárir/klárar.
*Stk. 5.* Tað skal vera nýttur fastur startur frá boyum ella øðrum. Er ov nógvur síðuvindur, verður ikki róð.

**§ 37.** Máldómarar, skrivarar og hjálparar verða tilnevndir av feløgunum og góðkendir av RSF.
*Stk. 2.* Inni á málinum skulu vera ein máldómari og aftur at honum ein hjálpari, ein høvuðsdómari, ein skjútti og tveir skrivarar.

## Kapittul 9
## Reglugerð fyri stevnugrunnin

**§ 38.** 15% av hvørjum seldum atgongumerki til kappróður í FM kappingini fara í stevnugrunnin.

**§ 39.** Tey feløg, sum ikki møta á aðalfundinum, fáa ongan pening úr stevnugrunninum sbrt. § 6.

**§ 40.** Peningurin verður at býta til feløgini eftir hesum reglum:
1. Fyri at fáa part í býtinum skal ein manning hava luttikið á minst fimm FM- stevnum í somu grein.
2. Ein manning fær ein part fyri hvørja FM-stevnu, luttikið varð á. Verður bátur

kolldømdur hevur hann ikki luttikið á stevnu. Peningurin verður lutaður feløgunum í mun til manningartal og luttøkustig.
3. Manningar, sum rógva á heimaplássi sínum, fáa ikki lut í býtinum ta ferðina, men koma annars undir júst tær somu reglur, sum hinar manningarnar.
4. Eingin manning kann fáa meira enn sjey býtispartar. Tað vil siga ein part fyri hvørja stevnu, hon luttekur á.

**§ 41.** RSF útflýggjar atgongumerki til allar stevnur, vanliga mikudag. Stevnufyrireikarum/kappróðrafeløgum áliggur at senda inn avrokning fyri atgongumerkjasøluna til RSF í seinast lagi 2 vikur eftir, at róðurin hevur verið. Avroknast skulu bæði seld og ikki seld atgongumerkir. Samstundis skal parturin, sum hesin grunnur hevur rætt til, sendast RSF, sum setir hann á serstaka konto. Um peningurin ikki verður goldin rættstundis, skal felagið gjalda 20% í staðin fyri 15%. Hesi 5% eyka fella beinleiðis til RSF.
*Stk. 2.* Er peningurin ikki goldin 2 mánaðir eftir, at róðurin hevur verið, missir stevnufyrireikarin/kappróðrarfelagið rættin at skipa fyri stevnuni næstu ferð. RSF avgerð, hvør skipar fyri stevnuni í staðin.

**§ 42.** RSF umsitur stevnugrunnin og avger øll ivamál. RSF syrgir fyri, at peningurin verður býttur út til feløgini, sum hava bátar, ið eiga rætt til part í býtinum, í seinasta lagi 14 dagar eftir, at aðalfundur hevur verið.

## Kapittul 10
## Bátur og trygd

**§ 43.** Øll bátanøvn skulu fráboðast og góðkennast av RSF, áðrenn nýggjur bátur verður uppmáldur.
*Stk. 2.* Allir luttakandi bátar í FM-róðri skulu hava loyvisbræv frá RSF. Loyvisbræv verður útflýggjað, tá ið báturin er uppmáldur og sýnaður av RSF. Fyri at fáa loyvisbræv skulu tollar, navnaskelti, fótalunnar og ringar vera á bátinum. RSF skal góðkenna litin á bátinum og skal sýna bátin, áðrenn loyvisbrævið verður útflýggjað avvarandi felagi. Avvarandi felag rindar kr. 500 fyri loyvisbrævið.

**§ 44.** Tað er ikki loyvt bátum at hava lýsingar á bátunum í FM-róðri.

**§ 45.** Tað er ikki loyvt at broyta nakað við bátinum frá upprunastandi uttan við loyvi frá RSF.

**§ 46.** Ein fótalunni skal vera gjørdur av einum planka av reinum træ. Tí er ikki loyvt at brúka krydsfiner, spønplátur og tílíkt tilfar. Fótalunnin skal vera festur í listan úti í borðinum og kann eisini verða festur í snælduna. Fótalunnin skal í mesta lagi vera fýra tummar høgur og í minsta lagi 1 3/4 tummar tjúkkur. Loyvt er at leggja oman á fótalunnan, so mann røkkur niður á við fótunum. Fótalunnin skal í minsta lagi vera 1 tumma niður frá bekkinum. Fótalunnin til lærmenninar á átta og tíggjumannafari, ovari fótalunni skal vera sum ein vanligur bekkur í hædd, niðari fótalunni skal lúka somu treytir sum ásett omanfyri. Róðursmaðurin kann nýta ein fótalunn. Hann skal lúka somu treytir sum ásett omanfyri.

**§ 47.** Útgerð til ferðmáting er loyvd við góðkenning frá RSF. Skrivlig umsókn skal sendast RSF til hvønn einstakan bát.

**§ 48.** Øll mát á bátinum verða máld út frá donskum / norskum tummum. Ein danskur / norskur tummi er 26,15 mm.

*Báta mát*

**§ 49.** Mát á 10-mannafarið:
Ásett bátamál: 1 Longd: 1a millum stavna, oman fyri enniknæ – ikki yvir +/- 1 tm13 alin10 tm 1b millum reisingina, 12 tummar oman kjøl – ikki yvir12 alin 4 tm 1c full kjalarlongd – ikki yvir 9 alin 9 tm

2 Sjey føtur framman fyri hálva longd:

2a breidd millum rima um yvirtrom – ikki yvir 2 alin14tm 2b breidd, 7 tummar oman fláborð við kjalaborðssúðu – ikki undir 1 alin11tm 2c dýbd av yvirtrom á rim niður á fláborð við kjalarborðsúðu – ikki undir 1 alin 2 tm

3 Á hálvari longd:
3a breidd millum rima um yvirtrom – ikki yvir 3 alin 3 tm 3b breidd, 7 tummar oman fláborð við kjalarborðssúðu – ikki undir 2 alin 1 tm 3c dýbd av yvirtrom á rim niður á fláborð við kjalarborðsúðu – ikki undir 0 alin21 tm 3d dýbd á sogu frá kjalbori við kjøl – ikki undir 0 alin 2 tm

4 Sjey føtur aftan fyri hálva longd:
4a breidd millum rima um yvirtrom – ikki yvir 2 alin16 tm 4b breidd, 7 tummar oman fláborð við kjalaborðssúðu – ikki undir 1 alin12 tm 4c dýbd av yvirtrom á rim niður á fláborð við kjalarborðsúðu – ikki undir 1 alin 0 tm

5 Bakrong:
5a frá stavni oman enniknæ til fremst á rong, miðskeiðis – ikki yvir 1 alin 9 tm

6 Bekkir:
6a bekkir skulu vera 7 tm +/- 1 tm, bekkirnir skulu vera javnt breiðir 0 alin 6 tm

*Stk. 2.* Mát á 8-mannafarið
Ásett bátamál: 1 Longd: 1a millum stavna, oman fyri enniknæ – ikki yvir +/- 1 tm12 alin 8 tm 1b millum reisingina, 10 tummar oman kjøl – ikki yvir11 alin 0 tm 1c full kjalarlongd – ikki yvir 8 alin 6 tm

2 Seks føtur framman fyri hálva longd:
2a breidd millum rima um yvirtrom – ikki yvir 2 alin12 tm
2b breidd, 6 tummar oman fláborð við kjalaborðssúðu – ikki undir 1 alin 6 tm 2c dýbd av yvirtrom á rim niður á fláborð við kjalarborðsúðu – ikki undir 1 alin 0 tm

3 Á hálvari longd:
3a breidd millum rima um yvirtrom – ikki yvir 3 alin 0 tm 3b breidd, 6 tummar oman fláborð við kjalarborðssúðu – ikki undir 1 alin22 tm 3c dýbd av yvirtrom á rim niður á fláborð við kjalarborðsúðu – ikki undir 0 alin20 tm 3d dýbd á sogu frá kjalborið við kjøl – ikki undir 0 alin 2 tm

4 Seks føtur aftan fyri hálva longd:
4a breidd millum rima um yvirtrom – ikki yvir 2 alin14 tm 4b breidd, 6 tummar oman fláborð við kjalaborðssúðu – ikki undir 1 alin 9 tm 4c dýbd av yvirtrom á rim niður á fláborð við kjalarborðsúðu – ikki undir 0 alin22 tm

5 Bakrong:
5a frá stavni oman enniknæ til fremst á rong, miðskeiðis – ikki yvir 1 alin 9 tm

6 Bekkir:
6a bekkir skulu vera 7 tm +/- 1 tm, bekkirnir skulu vera javnt breiðir 0 alin 6 tm

*Stk. 3.* Mát á 6-mannafarið
Ásett bátamál: 1 Longd: 1a millum stavna, oman fyri enniknæ – ikki yvir +/- 1 tm11 alin10 tm 1b millum reisingina, 10 tummar oman kjøl – ikki yvir10 alin 5 tm 1c full kjalarlongd – ikki yvir 7 alin12 tm

2 Fýra og ein hálvan fót framman fyri hálva longd:
2a breidd millum rima um yvirtrom – ikki yvir 2 alin 11 tm 2b breidd, 5 tummar oman fláborð við kjalaborðssúðu – ikki undir 1 alin 5 1⁄2 tm 2c dýbd av yvirtrom á rim niður á fláborð við kjalarborðsúðu – ikki undir 0 alin 21 1⁄4 tm.

3 Á hálvari longd:
3a breidd millum rima um yvirtrom – ikki yvir 2 alin19 1⁄2 tm 3b breidd, 5 tummar oman fláborð við kjalarborðssúðu – ikki undir 1 alin 18 tm 3c dýbd av yvirtrom á rim niður á fláborð við kjalarborðsúðu – ikki undir 0 alin 19 tm
3d dýbd á sogu frá kjalborið við kjøl – ikki undir 0 alin 2 tm

4 Fýra og ein hálvan fót aftan fyri hálva longd:
4a breidd millum rima um yvirtrom – ikki yvir 2 alin 12 1⁄2 tm 4b breidd, 5 tummar oman fláborð við kjalaborðssúðu – ikki undir 1 alin 8 tm 4c dýbd av yvirtrom á rim niður á fláborð við kjalarborðsúðu – ikki undir 0 alin 21 tm

5 Bakrong:
5a frá stavni oman enniknæ til fremst á rong, miðskeiðis – ikki yvir 1 alin 7 tm

6 Bekkir:
6a bekkir skulu vera 7 tm +/- 1 tm, bekkirnir skulu vera javnt breiðir 0 alin 6 tm

*Stk. 4.* Mát á 5-mannafarið
Ásett bátamál: 1 Longd: 1a millum stavna, oman fyri enniknæ – ikki yvir +/- 1 tm10 alin12 tm 1b millum reisingina, 10 tummar oman kjøl – ikki yvir 9 alin14 tm 1c full kjalarlongd – ikki yvir 7 alin 5 tm

2 Fýra og ein hálvan fót framman fyri hálva longd:
2a breidd millum rima um yvirtrom – ikki yvir 2 alin 8 tm 2b breidd, 5 tummar oman fláborð við kjalaborðssúðu – ikki undir 1 alin 2 tm 2c dýbd av yvirtrom á rim niður á fláborð við kjalarborðsúðu – ikki undir 0 alin 21 tm

3 Á hálvari longd:
3a breidd millum rima um yvirtrom – ikki yvir 2 alin15 tm 3b breidd, 5 tummar oman fláborð við kjalarborðssúðu – ikki undir 1 alin15 tm 3c dýbd av yvirtrom á rim niður á fláborð við kjalarborðsúðu – ikki undir 0 alin18 tm 3d dýbd á sogu frá kjalborið við kjøl – ikki undir 0 alin 2 tm

4 Fýra og ein hálvan fót aftan fyri hálva longd:
4a breidd millum rima um yvirtrom – ikki yvir 2 alin 9 tm 4b breidd, 5 tummar oman fláborð við kjalaborðssúðu – ikki undir 1 alin 5 1⁄2 tm 4c dýbd av yvirtrom á rim niður á fláborð við kjalarborðsúðu – ikki undir 0 alin 18 tm
5 Bakrong:
5a frá stavni oman enniknæ til fremst á rong, miðskeiðis – ikki yvir 1 alin 6 tm

6 Bekkir:
6a bekkir skulu vera 7 tm +/- 1 tm, bekkirnir skulu vera javnt breiðir 0 alin 6 tm
*Stk. 5.* Tveir ringar verða staðsettir í stokkarnar í bakskutin í báðum borðum. 65 tm frá róðurspinninum.

## Kapittul 11
## Aðrar reglur

**§ 50.** Víst verður til kunngerð nr. 66 frá 12. juni 2008 um bjargingarútgerð á kappróðrarbátum, sum er hjálagt sum fylgiskjal 1.

**§ 51.** Víst verður til Evstulóg hjá ÍSF, sum er hjálagt sum fylgiskjal 2.

**§ 52**. Hendan lóg kemur í gildi flaggdagin, tann 25. apríl 2021.
*Stk. 2.* § 23 kemur í gildi flaggdagin, tann 25. apríl 2022
*Stk. 3.* Til flaggdagin, tann 25. apríl 2022 verður § 23. soljóðandi: “ Við 5 mannaførum við gentum og dreingjum skal rógvari fylla í mesta lagi 18 ár í kappingarárinum. Við kappingarárið er at skilja tíðin frá og við 1. januar til og við 31. desember”.

**Almennar viðmerkingar:**

Ítróttardómstólurin hevur í fleiri ferum heitt á Róðrarsamband Føroya um at endurskoða lógarverkið.

Ítróttardómstólurin metir, at lógin fyri Róðrarsamband Føroya ikki kann metast sum ein generel lóg, men heldur eitt úrslit av ítøkiligum lógaruppskotum, sum eftir at hava verið samtykt á aðalfundum, eru skrivaði inn í lógina. Úrslitið av hesum er, at tað ber illa til at staðfesta, hvat er galdandi, tá ið lógin skal tulkast. Eisini eru viðurskifti í lógini, sum ikki vanliga eiga at vera ásett í lóg.

Hetta lógaruppskot tekur útgangsstøðið í galdandi lóg um Róðrarsamband Føroya. Í teimum førum har lógin innihaldsliga verður broytt, verður hetta útgreinað.

Lógarverkið er gjørt innanfyri Evstulóg hjá ÍSF, sum er hjáløgd sum fylgiskjali 2. Hetta eru reglurnar hjá ÍSF um dómsnevndir og viðgerð av kærum. Hesar reglur hevur RSF skyldu at halda seg innanfyri.

Høvuðsbroytingarnar í mun til galdandi skipan eru fyri tað fyrsta, at bygnaðurin av lógarverkinum hjá Róðrarsambandinum verður broyttur soleiðis, at lógarverkið hjá Róðrarsambandinum verður ásett í tveimum lógum. Ein lóg um Róðrarsamband Føroya og ein lóg um kappingarreglur hjá Róðrarsambandinum Føroyar.

Yvirskipaðu kappingarreglurnar verða ásettar í lógini um Róðrarsambandið Føroyar, meðan tær meira ítøkiligu kappingarreglurnar verða ásettar av nevndini í lógini um Kappingarreglur hjá Róðrarsambandinum Føroyar.

Tær ítøkiligu kappingarreglurnar, sum verða ásettar av nevndini, skulu tó framvegis góðkennast á aðalfundi, á eykaaðalfundi ella skrivliga av einum meiriluta av teimum feløgum, sum møttu á seinasta aðalfundi.

Ein onnur broyting í mun til galdandi lóg er, at uppskot til lógarbroytingar framyvir skulu eftirkannast av nevndini, áðrenn tey verða viðgjørd á aðalfundi. Orsøkin til hetta er, at neyðugt er at eftirkanna lógaruppskotini, soleiðis at tey lógartøkniliga eru í lagi, áðrenn tey verða viðgjørd á aðalfundi.

Nevndin eftirkannar øll innkomin broytingaruppskot til lógarbroytingar. Verður komið eftir, at lógaruppskot ikki eru lógartøkniliga í lagi, kunnar nevndin uppskotstillaran um hetta.

Broytir uppskotstillarin ikki uppskotið eftir hetta, verður tað viðgjørt á aðalfundi. Nevndin mælir tá frá at samtykkja tað.

Undir viðgerðini av hesum uppskotinum hevur spurningurin um heimildir hjá høvuðsdómarunum verið umrøddur.

Høvuðsdómararnir eru hægsti myndugleiki á kappróðararøkinum. Avgerðir, sum teir taka í kappingum, t.v.s. metingar, verða ikki broyttar uttan so at tað kann prógvast, t.d. við

videoupptøkum, at okkurt er farið fram, sum teir ikki hava sæð, og sum hevur avgerandi týdning fyri úrslitið av kappingini.

Í § 31 er ásett, at høvuðsdómarnir í upp til tveir tímar eftir, at róður hevur verið, kunnu strika róðurin, um tað vísir seg at hava verið umstøður undir róðrinum, sum við vissu kunnu sigast at hava ávirkað úrslitið av róðrinum.

**Serligar viðmerkingar:**
**Viðmerkingar til tær einstøku ásetingarnar:**

**Til § 1**
Í § 1 er nú ásett, at almenna teldupostadressan hjá RSF er rsf@rsf.fo, og at øll boð, sum hava við virksemi felagsins at gera skulu sendast til hesa teldupostadressu.

**Til § 2**
Søguliga sæð hevur høvuðsendamálið hjá RSF verið at skipa fyri føroyskum kapproðri, og tað er tað framvegis. RSF skipar nú eisini fyri innirógving og umboðar nú eisini Føroyar í alheims og millumlanda róðrarsamgongum. RSF arbeiðir miðvíst við at menna kapproður. Hetta merkir t.d., at RSF arbeiðir við nýggjum hættum at rógva kapp.

Leiðreglurnar hjá ÍSF um góðan atburð er galdandi fyri alt virksemið hjá RSF og tess feløgum.

**Til § 3**
Ásetingin er óbroytt í mun til galdandi lóg.

**Til § 4**
Ásetingin er óbroytt í mun til galdandi lóg. Av lógartøkniligum orsøkum eru partar av ásetingini fluttir.

**Til § 5**
Ásetingin er broytt á tann hátt, at nú er ikki longur neyðugt, at orðstýrarin er løgfrøðingur. Fyrr var tað kassameistarin, sum legði fram grannskoðaðan roknskap. Nú verður hetta broytt til, at tað er formaðurin sum leggur fram grannskoðaðan roknskap.

Somuleiðis er nágreinað, hvussu nevndin í RSF og dómsnevndin verða valdar.

Í nevndini og dómsnevndini kunnu ikki sita limir, sum eru nevndarlimir í róðrafelagi, sum er limur í RSF.

Á aðalfundi í 2015 varð samtykt, at atgonkumerkjaprísurin skuldi verða 100 kr. Aðalfundurin varð eisini samdur um, at aldursmarkið fyri at gjalda atgongumerki skuldi vera 16 ár.

**Til § 6**
Ásetingin er umorðað, men er annars óbroytt.

**Til 7**
Ásetingin um atkvøðurætt er broytt soleiðis, at stendur á jøvnum, tá ið atkvøtt verður, er uppskotið fallið.

**Til § 8**
Ásetingin er broytt. Nevndin kannar nú innkomin uppskot til lógarbroytingar við atliti at samlaða lógarverkinum. Vísir tað seg, at uppskot lógartøkniliga ikki er í samsvari við samlaða lógarverkið, fær uppskotstillarin boð um tað. Hann kann velja at seta uppskotið fram, men tá mælir nevndin frá at samtykkja tað.

Uppskot til lógarbroytingar skulu nú verða innkomin í seinasta lagi 6 vikur áðrenn aðalfundin. Sambært galdandi lóg er freistin 8 dagar áðrenn aðalfundin.

**Til § 9**
Ásetingin er óbroytt.

**Til § 10**
Ásetingin er broytt á tann hátt, at ásett er nú, hvussu innkallað verður til nevndarfund, og nær nevndin er viðtøkufør.

Eisini er ásett, at nevndin ásetur reglur um kapping, sum skulu góðkennast á aðalfundi, eykaðalfundi ella skrivliga av einum meiriluta av teimum feløgum, sum møttu á seinasta aðalfundi, og sum fáa pening úr stevnugrunninum.

**Til § 11**
Ásetingin varð samtykt á seinasta aðalfundi og ásetur, hvør kann binda RSF.

**Til § 12**
Ásetingin er óbroytt.

**Til § 13**
Ásetingin um kærur stendur í §§ 1-6 í galdandi lóg og snýr seg bæði um kærur til dómsnevndina og um kærur til RSF.

Í § 13 eru nú bert ásetingar um kærur til RSF og um agamál, sum RSF sjálvt tekur upp til viðgerðar.

**Til § 14**
Ásetingin er um kærur til dómsnevndina og er ásett í §§ 1-6 galdandi lóg, sum bæði snúgva seg um kærur til RSF og til dómsnevndina.

Í § 14 eru nú bert ásetingar um kærur til dómsnevndina. Dómsnevndin hevur heimild til at taka avgerðir í øllum málum, eisini í málum, sum eru tikin av RSF. Dómsnevndin kann tó ikki taka avgerð um at broyta meting dómarans í kapping.

**Til § 15**
Ásetingin staðfestir, at avgerðir hjá dómsnevndini eru endaligar og kunnu ikki viðgerast av RSF. Avgerðirnar kunnu tó leggjast fyri Ítróttardómstólin.

**Til §§ 16-20**
Ásetingar um stevnur er nú umorðaðar og fluttar aðrastaði í lógarverkinum, eitt nú til lógina um kappingarreglur hjá RSF. Samsýnining til dómarar er nú sett til kr. 1.250 fyri hvørja setvnu.

**Til § 21**
Reglurnar um kappingarteinar og bólkar eru ásettar í §§ 1-6 í galdandi lóg um kappingarteinar og bólkar.

Ongar broytingar verða gjørdar í hesum reglum, men partur av reglunum er fluttar til lógina um kappingarreglur hjá RSF.

**Til §§ 22-26**
Ásetingar um aldursmark eru umorðaðar og samanskrivaðar. Fyri barnaróður er nú ásett í § 22, at rógvarar skulu ganga í 5., 6. ella 7. klassa tá kappingarárið byrjar.

Sambært § 23 verður dreingja- og genturóðurin býttur upp í tvey, soleiðis at tey, sum eru 16 ár og yngri rógva fyri seg, og 17-18 ára gomul rógva fyri seg. Rógvari skal í mesta lagi fylla 18 ár í kappingarárinum. Við kappingarárið er at skilja tíðin frá og við 1. januar til og við 31. desember. Tað hevur verið eitt ynski frá feløgunum at deila dreingja- og genturóðurin í tveir bólkar fyri at tryggja, at hugurin hjá børnunum og ungum at rógva heldur fram, og fyri at gera kappingin javnari.

Í stk 2 er ásett, at tey, sum eru 16 ár ella yngri í kappingarárinum kunnu velja at rógva saman við teimum, sum hava fylt 17 ella 18 ár í kappingarárinum. Í so fall er tað galdandi fyri alt kappingarárið.

Í § 52 stk. 2 er ásett, at § 23 kemur í gildi flaggdagin, tann 25. apríl 2022.

**Til §§ 27-30**
Ásetingar um til- og frámelding eru umorðaðar, og partur av reglunum er fluttur til lógina um kappingarreglur hjá RSF. Ásett er nú, at um bátur ikki lýkur til- og frámeldingartreytirnar, verður felagið sektað við bót.

**Til §§ 31-37**
Ásetingar um døming eru nú umorðaðar, og partur av teimum er fluttur til lógina um kappingarreglur hjá RSF, men eru annars óbroyttar í mun til galdandi lóg.

Í § 36, stk. 2 er ásett, at róðurin verður skotin av um bátur hongur eftir.

Í § 36, stk 4 er ásett, at róð verður ikki um ov nógvur síðuvindur er. Tað er høvuðsdómarin, sum metir um líkindini og tekur avgerð um hetta.

**Til §§ 38-42**
Ásetingarnar um reglugerð fyri Stevnugrunnin eru óbroyttar í mun til galdandi lóg.

**Til §§ 43-49**
Ásetingar um bát og trygd eru í galdandi lóg §§ 1-11 bátur og trygd.

Í hesum uppskoti verður eisini ásett, hvar ringarnir til fastan start skulu staðsetast.

**Til §§ 50-51**
Kunngerð um bjarningarútgerð á kappróðrabátum og Evstalóg hjá ÍSF er partur av lógarverkinum hjá RSF.

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Kunngerð nr. 66 frá 12. juni 2008 um bjargingarútgerð á kappróðrarbátum,
Fylgiskjal 2: Evstalóg hjá ÍSF